


## KOMANDI TILTØK

**3. oktober** fær sendistovan vitjan einum skúlaflokki frá Miðnám av Kambsdali (F15R).

**4.-6. oktober** er Vestnorden Travel Mart 2016 í Reykjavík
7.-9. oktober er Arctic Circle í Reykjavík

**21. oktober** fær Sendistovan vitjan av nevndini fyri Føroya Handverksmeistarafelag. Sendistovan greiðir frá virksemi í byggivinnuni og møguleikar hjá føroyskum fyritøkum í Íslandi




*Mynd 1. Seinastu fýra veljarakanningarnar vigaðar saman. Heimild: kosningaspa.is*

## ALTINGSVALIÐ 29. OKTOBER.

Hóast knappar fýra vikur eru til valið, so er hetta val longu sera spennandi. Sitandi samgonga millum Sjálfstæðisflokkin (19 altingslimir) og Framsóknarflokkin (19 altingslimir), hevur tilsamans 38 altingslimir av 63. Seinastu veljarakanningarnar hava víst, at Sjálfstæðisflokkurin hevur framgongd, meðan Framsóknarflokkurin hevur haft stóra afturgongd í mun til valið í 2013. Stór misnøgd hevur verið við Framsóknarflokkin, serliga tí at Sigmundur Davíð Gunnlaugsson noyddist frá sum forsætisráðharri í apríl mánaði í ár, orsakað av sonevndu Panama-skjølunum. Hóast hetta, so helt Sigmundur Davíð Gunnlaugsson fram sum formaður í Framsóknarflokkinum. Seinasta sunnudag var val av formanni í Framsóknarflokkinum og úrslitið gjørdist, at Sigurður Ingi Jóhannsson, ið er forsætisráðharri og var næstformaður í flokkinum, vann á Sigmundi Davíð Gunnlaugssyni. Av 702 atkvøðunum, fekk Sigurður Ingi Jóhannsson 370 (≈ 52,7%) meðan Sigmundur Davíð Gunnlaugsson fekk 329 (≈ 46,9%). Triðja valevnið - Lilja Alfreðsdóttir, ið er uttanríkisráðharri, gjørdist hinvegin nýggjur næstformaður í Framsóknarflokkinum.

> *» Hvønn týdning formansskiftið kemur at hava fyri flokkin og valúrslitið 29. oktober, er óvist. Veljarakanningarnar hava í longri tíð givið Framsóknarflokkinum uml. 10%, meðan flokkurin til seinasta val fekk 24,4%. Stóru avbjóðingarnar hjá nýggja formanninum verða, at halda saman um flokkin og vinna honum størri undirtøku til valið.«*

Sjálfstæðisflokkurin verður spáddur at fáa uml. 25% av atkvøðunum, ið er eitt sindur minni enn seinasta val, tá ið flokkurin fekk 26,7%. Til seinasta val, stillaðu 14 flokkar upp og komu 6 av teimum í Altingið. Teir flokkar, sum ikki fingu sæti í Altinginum, 8 í tali, fingu tilsamans 11,9% av atkvøðunum. Til komandi val stilla 12 flokkar upp, og verður somuleiðis talan um, at uml. 12% av atkvøðunum ikki verða umboðaðar í Altinginum, so skulu ikki meira enn gott 44% av atkvøðunum til, fyri at kunna skipa meirilutastjórn.

## STUTT UM VALSKIPANINA Í ÍSLANDI



*Mynd 2. Altingið*

Í Íslandi hava tey eina politiska skipan, har politisku flokkarnir gera ein lista yvir valevni, sum veljarar kunnu atkvøða fyri. Hetta kallast listaval, og er øðrvísi enn persónval, har man velur ein persón. Hesir listar verða settir upp soleiðis, at valevnið ovast á listanum sleppur fyrst inn, næstovasta er næst, og sostatt er tað fyrst og fremst flokkurin sum avger, hvat valevni kemur inn á ting. Hetta er øvut í Føroyum, har flokkarnir eisini gera egnu listar, men hvør kemur inn, verður avgjørt eftir, hvussu nógvar atkvøður hvørt valevni fær. Annars minnir skipanin í Íslandi um ta skipan, sum vit høvdu í Føroyum fram til miðskeiðis í 1960-unum.

Áðrenn listarnir koma út, halda flokkarnir eitt undanval, sum avger hvør fær hvat pláss á listanum. Á hesum undanvali, atkvøða limirnir í flokkinum um, hvør kemur á hvat pláss á listanum. Tað eru tó ikki allir flokkar, sum nýta hesa skipan. Summir flokkar seta sjálvir listan saman. Tað er flokkurin sjálvur, sum avger hvussu listin skal gerast.

Á sjálvum valinum er tað talið av atkvøðum, sum avger, hvussu nógvar tingsessir hvør flokkur fær, samstundis sum tað er plássið á listanum, ið avger hvat valevni hjá flokkinum kemur inn. Hetta merkir, at sjálvt um valevnið, sum stendur á fjórða plássi á listanum, fær flestar atkvøður, kemur hann/hon ikki inn, uttan so at flokkurin sjálvur fær nóg mikið av atkvøðum til fýra tingsessir. Veljarin kann tó strika eitt valevni út, sum stendur ovari á listanum enn tað valevni, veljarin ynskir at seta sín kross við. Eru nóg mong, sum strika sama valevni á listanum út, so kann eitt valevni, ið stendur longri niðri á listanum koma longri upp í nummarrøðina á listanum, meðan hitt fer niður á listanum. Hetta hendi t.d. á valinum í 2007, tá ið Björn Bjarnason bleiv fluttur frá 2. plássi og niður á 3. pláss, vegna fleiri útstrikingar og tann sum stóð á 3. plássi flutti upp á 2. pláss.

Í Íslandi eru seks valdømi, har Reykjavíkar býur er býttur upp í tvey valdømi, meðan restin av landinum er býtt upp í fýra. Fyri at koma inn í Altingi, skal flokkurin hava fimm prosent av atkvøðunum, sum er tinggáttin í Íslandi og gevur umleið tríggjar tingsessir. Liggur flokkurin undir fimm prosent, fær flokkurin ongan sess. Í Føroyum er tinggáttin 3 prosent, ið gevur umleið ein tingsess. Í Íslandi eru 12 flokkar, sum stilla upp til Altingi í ár 2016, har bert 6 av teimum eru umboðaðir á Altingi í hesum valskeiði. Hetta kann vera av tí, at um ein flokkur fær 2,5 % av atkvøðunum, so fær hann val stuðul frá landinum, sjálvt um hann skal hava 5% fyri at koma inn á ting.

## ALTINGIÐ SAMTYKT ST VEÐURLAGSSÁTTMÁLAN



*Mynd 3. ST undirskrivingar hátíðarhaldið í New York í apríl í ár.*

Eitt samt Altingi hevur tikið undir við ST veðurlagssáttmálanum, sum komið varð ásamt um í París í fjør. Fyri at veðurlagssáttmálin skal fáa endaligt gildi, so má hann verða staðfestur av 55 londum, sum standa fyri 55% av heimsútlátinum.

Lilja Alfreðsdóttir, uttanríkisráðharri, sigur tað vera gott at síggja, at Ísland er eitt av teimum 55 londunum, sum vil gera sítt til, at fáa hesa avtalu endaliga staðfesta. 28 lond, ið standa fyri næstan 40% av heimsútlátinum, hava samtykt París sáttmálan, íroknað Kina og Amerika.

Síðani hava fleiri lond samtykt veðurlagssáttmálan.

*Sí meira her (á enskum)*

## UML. 700 ROKNAST AT SØKJA UM POLITISKT FRÍÐSKJÓL Í ÁR.




*Mynd 4. Íslendska útlendingastovan*

Íslendska Útlendingastovan sigur, at umsøkjarar streyma inn í landið og rokna tey við, at talan verður um 700, tá árið er av. Hetta er ein hækking á 98% sammett við seinasta ár. Fyrstu tríggjar dagarnar í oktober, vóru longu 20, sum søktu um friðskjól.

Útlendingastovan hevur ikki neyðuga orku til so nógv fólk í senn, og roknað varð ikki við, at talan fór at verða meira enn 300. So nógv fleiri, hevur við sær, at tað gerst væl dýrari, tí rindast skal fyri innivist o.a. Íslendska Útlendingastovan hevur fingið eina eykajáttan uppá 55 mió. ISK (≈ 3 mió. DKK), sum tó longu er brúkt, og væntandi fer kostnaðurin av flóttafólki at verða umleið 1,2 mia. ISK (≈ 70 mió. DKK) í ár.

*Sí meira her (á enskum)* og her (*á íslendskum*)

## ÍSLAND PARTUR AV EVROPEISKA FÍGGJAREFTIRLITINUM.



Altingið hevur samtykt uppskot um at seta í verk fyriskipanina hjá ES um fíggjareftirlit. Tað vóru 31, ið atkvøddu fyri, meðan 18 vóru ímóti. Andstøðan var ímóti, og mótmælti hon fyriskipanini sum verandi grundlógarstríðandi. Hetta tí at fyriskipanin letur frá sær vald til ein altjóða stovn uttanfyri Ísland.

Fyriskipanin ger, at ES reglur innan fíggjareftirlitsøkið eisini vera galdandi í Íslandi. Tað vil siga, at evropeisk trygdar- og pensjónseftirlit, eins og evropeisk eftirlit av fíggjargeiranum, verða stýrandi fyri Ísland.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## FLEIRI FERÐAFÓLK SEINASTU 8 ÁRINI ENN UNDANFARNU 58




*Mynd 5. Yvirlit yvir ferðafólk frá 1949 – 2015/16*

Ísland byrjaði í 1949 at skráseta talið av ferðafólki. Síðani tá, hava fleiri ferðafólk vitjað Ísland millum 2008- 2016, enn millum 1949-2007. Millum 1949 og 2007 vitjaðu umleið 7 mió. ferðafólk landið, men frá 2008-2016 er talið longu komið upp á umleið 8 mió. ferðafólk. Forsøgnirnar spáa at í ár verður talið 1,7 mió., sum er ein vøkstur uppá 38% frá 2015, og íslendingar vænta sær 2,2 mió. ferðafólk í 2017.

Stóra talið av ferðafólki hevur sína ávirkan á náttúruna og kanningar vísa, at einans 16% av íslendingum halda, at ferðafólk hava jaliga ávirkan á náttúruna. Tað er tó enn ein meiriluti av íslendingum, 60,4%, sum halda at ferðafólk sum heild eru jalig fyri Ísland. Hetta tal er tó minkandi, tí í fjør vóru tað 67,2% sum høvdu somu fatan. Hetta sæst serliga væl aftur í Reykjavík, har bert 54,3% halda ferðafólk hava ein jaliga ávirkan á býin, meðan talið var 67,5% í fjør.

*Sí meira her (á enskum er eisini ein áhugaverd talva, sum lýsir støðuna nærri, hvussu íslendinga meta ávirkanina av ferðafólki))*

## NÓGV FERÐAFÓLK NÝTA ÓSKRÁSETTAN GISTINGARHÁTT.




*Mynd 6. Yvirlit yvir gistingarhættir og hvussu ferðafólk gista.*

Mett verður at 42% av ferðafólki, sum gista í Íslandi, eru ikki skrásett í nøkrum yvirliti. Hetta vil siga, at tey fóru ikki á hotell, vallaraheim, tjaldingarpláss ella annan skrásettan gistingarstað, men heldur funnu sær gisting gjøgnum býtisbúskap sum t.d. AirBnB, húsvognar ella gistu úti í náttúruni. Hetta kom fram í kanningini, sum Arion Banki ger fyri ferðavinnuna á hvørjum ári.

Tað er stórur munur á, hvat ferðafólk sjálv siga, og hvat verður skrásett í skipanini. Arion banki hugdi eftir tølunum av skrásettum gistingum. Tey vísa, at hvørt ferðafólk í miðal hevur gist 4,5 nætur í Íslandi tey seinastu fimm árini, meðan spurnarkanningar hjá ferðaskrivstovum vísa, at ferðafólk í miðal gista 7,6 nætur. Hetta vísir at umleið 42% av øllum gistingum í Íslandi verða ikki skrásettar. Ein onnur kanning, sum nýliga varð gjørd, vísti eisini, at 20% av ferðafólki velja at nýta AirBnB sum gistingarhátt. Harafturat er mongdin av kømurum hjá AirBnB vaksin frá 2.353 í fjør til 3.200 í ár.

Kanningin vísir, at parturin av ferðafólki, ið velja henda gistingarhátt, hevur verið tann sami tey síðstu 6 árini, millum 39-42%, meðan hotell gistingar hava ligið millum 26-30%. Í Íslandi er ein skattur á gisting, sum er 100 ISK pr. nátt, og tað merkir at landið missir umleið 220 mió. ISK (11 mió. DKK) í gistingarskatti.

Sí meira her (á íslendskum)

## KVOTUR Á UPPBOÐI OG LÆRAN ÚR FØROYUM




*Mynd 7. Sjúrður Skaale millum fyrilestrarhaldararnar*

Sjúrður Skaale var í Reykjavík 8. september, í sambandi við eitt tiltak, sum Samfylkingin (Javnaðarflokkurin í Íslandi) skipaði fyri um uppboðssøluna í Føroyum og ætlaðu broytingarnar í fiskivinnuni. Sjúrður helt fyrilestur um uppboðssøluna, og um grundgevingar fyri, at skipa fiskivinnuskipanina við uppboðssølu.
Millum luttakararnar vóru eisini umboð fyri reiðarar og fiskimenn í Íslandi. Tey førdu fram, at fiskivinnan í Íslandi hevur stóra framgongd, og tað er júst tí at skipanin er skipað sum hon er. Tey vildu tí ikki ráða íslendsku politisku flokkunum til at broyta skipanina, og hildu heldur ikki at føroyingar skuldu royna seg við eini skipan, ið nýtir uppboðssølu sum býtistól.

Tiltakið endaði við kjaki millum Sjúrð og tey, sum talaðu fyri uppboðssølu og tey, ið talaðu ímóti. Nógv verður tosað um føroysku uppboðssøluna, í hesum døgum í Íslandi, tí nú verður Altingsval, og aftaná at Føroyar hava gjørt royndir við hesum leisti, eru nakrir politikarar í Íslandi farnir at tosa um at gera tað sama her í Íslandi.

Samanumtikið, so er íslendska fiskivinnan ímóti einari skipan við uppboðssølu. Tað verði seg bæði reiðarar, manningarfeløg o.o., sum varða av fiskivinnuni, meðan nakrir politiskir flokkar halda, at íslendski landskassin átti at fingið størri part av virðinum av fiskitilfeinginum.

## FUNDUR VIÐ LESANDI OG MENTANARNEVND LØGTINGSINS



*Mynd 8. Løgtingsins mentanarnevnd saman við føroyskum lesandi í Íslandi og sendimanninum.*

Leygardagin, 17. september, var mentanarnevnd løgtingsins á vitjan á Sendistovuni. Í hesum sambandi hevði sendistovan funnið fram til teir føroyingarnar, sum lesa í Íslandi. Talan er um 15, sum vóru bodnir til Sendistovuna at hitta og fundast við mentanarnevndina. Fimm møttu til tiltakið og greiddu tey frá, hvussu er at vera lesandi í Íslandi og hvørjar avbjóðingar tey høvdu.

Samanumtikið vóru føroyingarnir væl nøgdir við lestrarumhvørvið í Íslandi. Serliga var tað tey tøttu bondini millum Føroyar og Ísland og mentanin, sum líkist nógv tí føroysku, sum gjørdu at tað var lætt at falla til í Íslandi. Eisini hildu tey lesandi, at undirvísingin í Íslandi var meiri týðandi fyri føroyingar, síðan hon líkist so nógv føroyskum viðurskiftum, av tí at fortreytir og fortíð eru meira javnlík enn t.d. við at lesa í Danmark.

Einasti trupulleikin við at lesa í Íslandi, er vaksandi skúlagjaldið sum tey lesandi skulu rinda. Ein trupulleiki er, at tað er torført at fáa ÚSUN í Føroyum at gjalda, tí at danska SU-skipanin er avmarkandi í hesum sambandi. Her er talan um ávísar reglur í Danmark, sum forða fyri at føroyingar í Íslandi kunnu fáa útgoldið skúlagjaldið úr Føroyum. Sum skilst, so verður arbeitt við hesum í Føroyum, tí fortreytirnar hjá donskum lesandi og føroyskum lesandi eru ikki eins.

Sendimaðurin greiddi eisini frá virkseminí hjá Sendistovuni og serliga, hvat sendistovan kundi bjóða og hjálpa teimum lesandi við.

Alt í alt eitt gott tiltak, sum partarnir vóru væl nøgdir við.

Mánadagin, 19. september, vitjaði Mentanarnevndin sendistovuna og greiddi sendimaðurin serliga frá virksemi sendistovunnar á teimum økjum, sum nevndin starvast innanfyri.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook